Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 14.08.2025
Mál nr.: 25/20885
Málsviðgjørt: SSJ
Ummælistíð: N/A
Eftirkannað: 03.08.2025

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina
(Víðkaðar heimildir at seta ávís onnur avmarkandi tiltøk í verk mótvegis Russlandi ella Hvítarusslandi, sum hava til endamáls at tryggja frið og trygd ella virðing fyri fólkaræði, rættarsamfelagi, mannarættindum ella altjóðarætti annars, heruppií í sambandi við hybridhóttanir, brot á mannarættindi, o.a.)

§ 1. Í løgtingslóg nr. 90 frá 17. mai 2022 um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina, sum broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 22. juni 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á løgtingslógini verður broytt til:
"Ávís amarkandi tiltøk."

2. Í § 1, § 3, stk. 1 og 3, § 4, stk. 1 og 4, § 5, § 6, stk. 2, , § 9, § 10, stk. 2, og § 11, stk. 2, verður "landsstýrismaðurin" broytt til "landsstýrisfólkið".

3. Í § 7 verður "landsstýrismanninum" broytt til "landsstýrisfólkinum".

4. Yvirskriftin yvir § 5 verður orðað soleiðis:

"*Onnur tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina*"

5. Aftaná § 5, men áðrenn yvirskriftina yvir § 6, verður sett:

"*Onnur tiltøk*

§ 5 a. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um onnur tiltøk mótvegis Russlandi og Hvítarusslandi enn tey, ið eru nevnd í §§ 1, 3 og 4 við støði í avmarkandi tiltøkum samtykt av millumtjóða felagsskapum, ella sum hava breiða millumtjóða undirtøku, og sum hava til endamáls at tryggja frið og trygd ella virðing fyri fólkaræði, rættarsamfelagi, mannarættindum ella altjóðarætti annars."

6. § 8 verður orðað soleiðis:

"**§ 8**. § 18 í løgtingslóg um fyrisitingarlóg er ikki galdandi fyri avgerðir, tiknar sambært reglum, ásettar við heimild í §§ 4 og 5 a, og fyri upptøku av likamligum persónum, løgfrøðiligum persónum, eindum o.ø. á listar sambært § 6."

7. Í § 10, stk. 1 verður "§§ 3-5" broytt til: "§§ 3-5 a".

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Síðani Russland innlimaði Krim-hálvoynna í 2014, og eftir innrásina í Ukraina 24. februar 2022, hava ES og samsint lond sett í verk og víðkað avmarkandi tiltøkini, sum hava til endamáls at gera tað kostnaðarmiklari fyri Russland og Hvítarussland at halda fram við atgerðum, sum gera seg inn á sjálvræðisrættin, óheftnið og støðufestið hjá Ukraina.

Við løgtingslóg nr. 90 frá 17. mai 2022 varð heimilað landsstýrisfólkinum í uttanríkismálum at seta líknandi tiltøk í gildi í Føroyum, við støði í avmarkandi tiltøkum, samtykt í millumtjóða felagsskapum, ella sum hava breiða millumtjóða undirtøku, og sum hava til endamáls at "...tryggja virðing fyri fólkaræði, mannarættindum og altjóðarætti í sambandi við atgerðir, sum máa undan ella hótta sjálvræðisrættin, óheftnið og støðufestið hjá Ukraina."

Síðani 2024 hevur Evropasamveldið arbeitt miðvíst við at seta í verk avmarkandi tiltøk, sum ikki beinleiðis eru knýtt at innlimanini av Krim ella innrásini í Ukraina, men sum viðvíkja viðurskiftum, sum gera seg galdandi innanhýsis í Russlandi ella atgerðum, sum eru framdar í ella móti øðrum londum.

Ráðið fyri Evropasamveldið tók tíðskil 27. mai 2024 avgerð um tiltøk í sambandi við brot á grundleggjandi mannarættindi og vantandi rættartrygd innanhýsis í Russlandi og 8. oktober 2024 avgerð um tiltøk í ljósinum av destabiliserandi virksemi, sonevndum hybridhóttanum (hybrid threats), sum ES metir, Russland hevur sett í verk ella hevur umbiðið. *Hybridhóttan* er felagsheitið fyri ymisk sløg av atgerðum, sum eru undir markinum fyri hernaðarligum virksemi, men sum eru ætlaðar annaðhvørt at røkka sama endamáli, ella at styðja verulig hernaðarátøk, heruppií við netálopum, FIMI[1], uppíblanding í fólkaræðisligar skipanir, nýtslu av flóttafólkastreymum, kaðalslit, njósnaraátøk o.a.

Í kjalarvørrinum av hesum hevur ES sett í verk tiltøk móti persónum og eindum, sum eru undir illgruna fyri at bróta grundleggjandi mannarættindi ella at viðvirka í sambandi við hybridatgerðir[2] [3] [4]. Tað eru serliga tiltøkini í sambandi við hybridhóttanir eftir fyriskipan 2024/2642, sum eru viðkomandi fyri Føroyar, tí tvey russisk feløg, Murman SeaFood og Norebo JSC, sum hava fiskiloyvi í føroyskum sjógvi, eru millum tey, sum í ES eru undir illgruna fyri hybridatgerðir, og sum sostatt koma undir strong avmarkandi tiltøk.

Hóast nevndu feløg eisini hava fiskiloyvi í norskum sjógvi, boðaði norska stjórnin tann 7. juli í ár frá, at Noreg fór at seta hybridtiltøkini hjá ES í verk. Sambært fjølmiðlafráboðanini[5] frá norsku stjórnini merkir hetta ítøkiliga, at skip, sum eru ogn hjá hesum feløgum, ikki longur sleppa í norskar havnir, ikki longur sleppa í norskt sjóøki, t.e. 12 fjórðingar úr grundlinjunum, og at fiskiloyvi í norskum serbúskaparøki, t.e. innan fyri 200 fjórðingar, ikki verða latin nevndu

[1] *"Foreign Information Manipulation and Interference".*
[2] Sí ráðsavgerð 2024/1484 (EU): https://eur-lex.europa.eu/eli/dec/2024/1484/oj/eng
[3] Sí fyriskipan 2024/1485 (EU): https://eur-lex.europa.eu/eli/reg/2024/1485/oj/eng
[4] Sí fyriskipan 2024/2642 (EU): https://eur-lex.europa.eu/eli/reg/2024/2642/oj/eng
[5] https://www.regjeringen.no/no/aktuelt/norge-slutter-opp-om/id3114560/ "*Skip fra de to rederiene vil miste adgang til norske havner og territorialfarvann. Det vil i utgangspunktet ikke utstedes lisenser for fiske i norsk, økonomisk sone til skip fra de to rederiene*."

feløgum, sum higartil eisini hava havt skip við fiskiloyvi í norskum sjógvi. Serstakt undantak frá forboðnum er ásett viðvíkjandi havnum og sjóøki við Svalbard[6].

Tiltøkini, sum Noreg hevur sett í verk, eru ásett við heimild í sanksjonsloven[7], sum er karmlóggáva, sum heimilar norsku stjórnini at seta í verk ymisk sløg av tiltøkum, sum eru samtykt í millumtjóða felagsskapum, ella sum hava breiða millumtjóða undirtøku, og sum eitt nú kunnu hava til endamáls at varðveita frið, trygd, virðing fyri fólkaræði, rættarsamfelagi, mannarættindi og altjóðarætti annars.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur mett um, hvørt tiltøkini, sum ES nú hevur sett í gildi, eisini kunnu rúmast innan fyri galdandi løgtingslóg. Sambært § 1 í heimildarlógini er ein av fortreytunum fyri at seta í verk tiltøk, at tey hava til endamáls at tryggja "...sjálvræðisrættin, óheftnið og støðufestið hjá Ukraina", og hetta svarar til tiltøkini hjá ES eftir eitt nú fyriskipan 269/2014 og 2014/833 (EU). Endamálið við hesum fyriskipanum, sum føroyska heimildarlógin eisini byggir á, er at raka russiska búskapin, sum fíggjar áhaldandi krígsførsluna í Ukraina. Endamálið við tiltøkunum sambært fyriskipanunum 2024/2642, 2024/1484 og 2024/1485 (EU) er hinvegin ávikavist at svara aftur russiskum hybridatgerðum, sum kunnu fara fram í øðrum londum enn Ukraina, og at seta í verk tiltøk móti brotum á grundleggjandi mannarættindi og vantandi rættartrygd innanhýsis í Russlandi. Nevndu fyriskipanir kunnu sostatt ikki knýtast at innlimanini av Krim ella innrásini í Ukraina, og hesar fyriskipanir kunnu heldur ikki haldast at vera ætlaðar at røkka tí endamáli, sum er nevnt í § 1 í galdandi løgtingslóg.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið metir tískil, at nevndu ES-tiltøk ikki rúmast innan fyri verandi heimildir í galdandi løgtingslóg. Í hesum sambandi kann viðmerkjast, at møguliga heimildarásetingin, t.e. § 5 í heimildarlógini, sambært viðmerkingunum til upprunaliga lógaruppskotið, er ætlað sum ein heimild at víðka ítøkiligu tiltøkini, sum heimild er at seta í verk eftir §§ 3 og 4, soleiðis at tiltøkini kunnu fevna um meira enn einans handilsavmarkingar og frysting av ognum o.ø. Hetta eru t.d. tiltøk á fjarskiftis- og mentanarøkinum, sum eisini eru sett í verk í ES við eitt nú fyriskipan 2014/833 (EU).

Hóast tað er innihaldsligur og formligur munur á nevndu fyriskipanum, so hava tiltøkini hjá ES kortini sama grundleggjandi endamál, nevniliga at fáa Russland at broyta atburð; tað veri seg móti Ukraina, móti ES-limalondum ella móti egnum borgarum. Orsøkin til uppskotið er tískil, at um Føroyar framhaldandi skulu kunna siga seg stuðla átøkunum, sum ES og onnur lond hava sett í verk móti Russlandi, so verður tað mett neyðugt, at heimildirnar hjá landsstýrinum at áseta tiltøk verða víðkaðar til eisini at fevna um onnur tiltøk, sum ikki neyðturviliga eru knýtt at russisku krígsførsluni í Ukraina, og sum eisini kunnu fara fram í øðrum londum enn Ukraina. Landsstýrið metir, at hetta uppskot er eitt neyðugt stig á leiðini at røkka hesum endamáli.

Uppskotnu broytingarnar í § 1, nr. 1, 3, 5 og 6 eru fylgibroytingar. Uppskotna broytingin í § 1, nr. 2, er ein ritstjórnarlig broyting, har orðið "landsstýrismaðurin" í løgtingslógini verður broytt til "landsstýrisfólkið".

1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi lóggáva er løgtingslóg nr. 90 frá 17. mai 2022 um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina, sum broytt við løgtingslóg nr. 82 frá 22. juni 2023. Løgtingslógin er

[6] Sí forskrift om endring af 8. juli 2025, nr. 896: https://lovdata.no/dokument/LTI/forskrift/2025-07-08-1505
[7] Lov om gjennomføring av internasjonale sanksjoner (sanksjonsloven), sí: https://lovdata.no/dokument/NL/lov/2021-04-16-18

sambært § 2 galdandi í føroyskum umveldi, t.e. føroyskt landaøki, havnir og sjóumveldi út til 12 fjórðingar, umborð á skipum undir føroyskum flaggi, og fyri persónar, sum eru búsitandi í Føroyum, og fyri fyritøkur, sum eru skrásettar í Føroyum, ella sum verða riknar heilt ella lutvíst úr Føroyum.

Fyri málsøki, sum ikki eru yvirtikin, heruppií serliga á peningastovns- og loftferðsluøkinum, er *lov nr. 762 af 13. juni 2023 for Færøerne om gennemførelse af restriktive foranstaltninger over for Rusland og Belarus*, sett í gildi fyri Føroyar.

Løgtingslógin er karmlóggáva, hvørs § 1, stk. 1, heimilar landsstýrisfólkinum at áseta avmarkandi tiltøk móti persónum og eindum, "...við støði í avmarkandi tiltøkum, samtykt í millumtjóða felagsskapum, ella sum hava breiða millumtjóða undirtøku, og sum hava til endamáls at tryggja virðing fyri fólkaræði, mannarættindum og altjóðarætti í sambandi við atgerðir, sum máa undan ella hótta sjálvræðisrættin, óheftnið og støðufestið hjá Ukraina".

Í serligu viðmerkingunum til § 1 í upprunaliga lógaruppskotinum verður greitt frá, at orðingin "millumtjóða felagsskapir" fyrst og fremst merkir ES, men ikki er avmarkað til hendan felagsskap, og at "breið millumtjóða undirtøka" merkir undirtøka millum samsint lond og ikki neyðturviliga, at Føroyar skulu taka undir við tiltøkum hjá ávísum londum, ella at eitt ávíst tal av londum frammanundan skulu hava sett tiltøkini í verk. Eisini verður greitt frá, at orðingin hevur við sær eina endamálsavmarking, soleiðis at avmarkandi tiltøkini skulu hava til endamáls at tryggja virðing fyri fólkaræði, mannarættindum og altjóðarætti.

Serligu viðmerkingarnar til § 1 greiða ikki nærri frá orðingini "...atgerðir, sum máa undan ella hótta sjálvræðisrættin, óheftnið og støðufestið hjá Ukraina". Tó skerst ikki burtur, at bæði heitið og teksturin í løgtingslógini vísir til atgerðirnar móti Ukraina, og ger hetta seg eisini galdandi fyri tær ES-fyriskipanir, sum eru fyrimyndin fyri føroysku tiltøkunum. Fatanin hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum er tískil, at orðingin ikki er tilvildarlig, og at hon hevur við sær ávísar avmarkingar fyri, hvørji avmarkandi tiltøk kunnu setast í verk við heimild í løgtingslógini.

Tiltøkini, sum heimild er at áseta sambært løgtingslógini, eru eitt nú:

- handilsavmarkingar í mun til íløgur og handil við vørum og tænastum, forboð fyri innflutningi, útflutningi ella flutningi av vørum, tøkni og tænastum (§ 3),
- frysting av øllum sløgum av ognum, heruppií fastogn og leysafæ, sum kann nýtast at fáa til vegar pening, vørur, tænastur ella annað (§ 4),
- onnur avmarkandi tiltøk, heruppií serliga onnur tiltøk, eitt nú forboð móti fjarskiftissambandi, mentanar- og vísindasamstarvi, luttøku í búskaparligum virksemi, o.a. (§ 5),
- forboð fyri atgongd at føroyskum havnum (§§ 3 og 5), og
- fráboðanarskylda fyri likamligar og løgfrøðiligar persónar, stovnar, myndugleikar og onnur (§ 9).

Tiltøkini kunnu eitt nú vera tey tiltøk, sum ES hevur sett í gildi í sambandi við innlimanina av Krim og innrásina í Ukraina, heruppií við fyriskipan (EU) 269/2014[8], 833/2014[9], 2022/263[10], 765/2006[11] o.a. Tað er somuleiðis fatanin hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, at viðkomandi

[8]Sí fyriskipan 269/2014 (EU): https://eur-lex.europa.eu/eli/reg/2014/269/oj/eng
[9]Sí fyriskipan 833/2014 (EU):https://eur-lex.europa.eu/eli/reg/2014/833/oj/eng
[10]Sí fyriskipan 2022/263 (EU):https://eur-lex.europa.eu/eli/reg/2022/263/oj/eng
[11]Sí fyriskipan 765/2006 (EC):https://eur-lex.europa.eu/eli/reg/2006/765/oj/eng

ES-rættarkeldur á økinum kunnu nýtast sum tulkingarískoyti í teimum førum, har ivamál stinga seg upp í praksis um tulking av føroyska regluverkinum. Um treytirnar sambært løgtingslógini eru loknar, so eru heimildirnar tó ikki avmarkaðar til tiltøk, sum millumtjóðafelagsskapurin ES hevur sett í verk.

Avmarkandi tiltøkini, sum Føroyar hava sett í verk á yvirtiknum málsøkjum, eru ásett í kunngerð nr. 108 frá 18. november 2024 um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina, sum broytt við kunngerð nr. 37 frá 24. mars 2025. Fyri ikki-yvirtikin málsøki er *bekendtgørelse nr. 1058 af 14. juli 2023 for Færøerne om restriktive foranstaltninger mod Rusland og Belarus på Erhvervsministeriets område* sett í gildi fyri Føroyar.

Tiltøkini, sum Føroyar hava sett í verk við heimild í løgtingslógini, eru eitt nú:

- frysting av ogn hjá ávísum persónum og eindum,
- avmarkingarnar viðvíkjandi útflutningi og flutningi av ávísum vørum og tænastum til Russlands ella eindir í Russlandi,
- avmarkingar viðvíkjandi innflutningi av ávísum vørum við uppruna í Russlandi og ávísum tænastum, og
- forboð fyri inn- og útflutningi av vørum ella tænastum úr ukrainsku landslutunum Donetsk, Kherson, Krim, Luhansk og Zaporizhzhia, og
- forboð fyri at loyva skipum undir russiskum flaggi at koma í føroyskar havnir.

Tiltøkini, sum eru sett í verk í ES og í Føroyum, fevna um avmarkandi tiltøk móti ítøkiligum persónum og eindum, sum ES hevur sett á viðkomandi sanksjónslista. Frysting verður framd fyrisitingarliga í sambandi við, at viðkomandi sanksjónslistar verða lýstir við heimild í § 4 í galdandi løgtingslóg, sum svarar til leistin hjá ES. Frysting av ognarlutum hevur við sær, at almennir myndugleikar og privatpersónar og virkir hava skyldu til at tryggja, at ogn hjá persónunum og eindunum á listanum á ongan hátt kann verða nýtt at fáa til vegar pening, vørur ella tænastur, heruppií, men ikki avmarkað til, við at selja, leiga út ella veðseta ognirnar. Hugtakið "ogn" skal í hesum sambandi skiljast í breiðastu merking. Fevnt av ognarhugtakinum er ein og hvør fíggjarlig ogn, t.e. peningur, virðisbrøv, rentur o.tíl., umframt búskaparligt tilfeingi annars, t.d. fastogn, leysafæ, loyvi o.a.

Tá ið metast skal um, hvørt ein persónur ella eind, sum eru fevnd av avmarkandi tiltøkunum, er eigari av einari ogn, er byrjanarstøði vanligu tingsrættarligu reglurnar. Er ivamál um, hvørt eitt felag ella ein onnur løgfrøðilig eind er ogn hjá einum persóni ella einari eind, sum er fevnd av avmarkandi tiltøkunum, verður ognarskapur sum byrjanarstøði staðfestur við beinleiðis ella óbeinleiðis ognarskapi upp á 50% ella meira av partapeninginum (ella líknandi). Ræðisrættur yvir einum felagi ella einari løgfrøðiligari eind verður í sanksjónshøpi javnsettur við ognarskap. Ræði kann verða staðfest eftir einari ítøkiligari meting, eitt nú við at meta um, hvør hevur rætt til at velja størsta partin av evstu leiðsluni, rættindi sambært viðtøkum ella partaeigaraavtalum, rætt til at ráða yvir vinningsbýtinum o.tíl.

Við fyriliti fyri rættartrygdini hjá persónum og eindum, sum eru sett á sanksjónslistarnar, skulu ES-myndugleikarnir eitt nú sambært grein 13 (4) í fyriskipan 2024/2642 endurskoða sanksjónslistarnar sambært fyriskipanini í minsta lagi 12. hvønn mánað. Eisini ber til at heita á ES-myndugleikarnar um at endurskoða grundarlagið fyri einari avgerð um at seta ein persón ella eind á sanksjónslistarnar. Um ES-myndugleikarnir ikki geva persóninum ella eindini

viðhald, so ber til at leggja málið fyri ES-dómstólin eftir vanligu ES-reglunum[12]. Sambært § 7 í galdandi løgtingslóg kann landsstýrisfólkið taka avgerð um at strika ítøkiligar persónar ella eindir av nevndu listum, tó einans fyri persónar, sum búgva í Føroyum, og eindir, sum eru skrásettar í Føroyum.

Tiltøkini fevna eisini um handilsavmarkingar, sum eru galdandi alment fyri allar persónar og løgfrøðiligar eindir, sum eru fevnd av virkisøkinum hjá løgtingslógini. Tiltøk kunnu eitt nú fevna um forboð fyri øllum inn- ella útflutningi ella flutningi av ávísum vørum ella tænastum ávikavist úr ella til persónar ella eindir, sum eru búsitandi ella hava heimstað í Russlandi. Tiltøkini kunnu tó eisini vera málrættað ávísum vinnugeirum, heruppií fíggjar-, tøkni-, ráðgevara- og orkugeiranum.

Handilsavmarkingarnar, sum eru settar í verk í ES og í Føroyum, fevna sum byrjanarstøði ikki um matvørur[13], heruppií fiskavørur. Meginparturin av øllum útflutningi Føroya til Russlands, bæði áðrenn og eftir innrásina í Ukraina í 2022, hevur verið fiskavørur, og er størsti parturin av føroyska útflutninginum til Russlands tískil ikki fevndur av beinleiðis handilsavmarkingum. Tó kunnu handilsavmarkingarnar, sum Føroyar hava sett í verk samsvarandi ES-leistinum, fevna um tøkni, sum kann verða nýtt ella er ætlað til nýtslu í matvøru- ella fiskiídnaðinum.

Regluverkið um avmarkandi tiltøk hevur við sær eitt nærlagniskrav (due-dilligence). Í stuttum merkir hetta, at tað er uppgávan hjá teimum, sum eru fevnd av reglunum um avmarkandi tiltøk, heruppií almennir myndugleikar og privat vinnurekandi, at útinna rímiligt nærlagni til tess at tryggja, at reglurnar verða hildnar, heruppií at ogn hjá persónum og eindum, sum er fryst, ikki kann verða nýtt at fáa til vegar pening, vørur, tænastur, o.a., umframt at ogn ikki má latast til, ella vera til taks hjá nevndu persónum ella eindum.

Til ber ikki at gera eina neyva lýsing av, hvørjar gerðir skulu útinnast til tess at røkka kravinum um rímiligt nærlagni, og veldst hetta tískil um eina ítøkiliga meting, sum skal gerast frá máli til mál. Yvirskipað ber til at siga, at størri krøv um nærlagni verða sett, tá ið talan t.d. er um seljarar, sum eru stórar fyritøkur, í sambandi við stórar ella torgreiddar transaktiónir, ella tá ið ábendingar eru um, at viðskiftafólkið er ella virkar vegna persónar ella eindir, ið eru fevnd av avmarkandi tiltøkunum. Nærlagniskravið kann hava við sær, at neyðugt er at fáa til vegar upplýsingar um viðskiftafólkið, áðrenn ein transaktión verður framd, t.d. við frammanundan at fáa til vegar eigarayvirlit úr almennum virkisskráum, upplýsingar úr skipaskráum o.a.

Tann 27. november 1977 gjørdu Føroyar og táverandi Sovjetsamveldið sáttmála um fiskiviðurskifti[14]. Sáttmálin hevur virkað sum karmur fyri árligu fiskiveiðusamráðingunum millum Føroyar og Russland, seinast 27. november í 2024, sum eitt nú fevnir um kvotu- og atgongdarbýti. Tað hevur higartil verið metingin hjá landsstýrinum og hjá meirilutanum í Løgtinginum, at fyrilit eigur at havast fyri, at fiskiveiðusamstarvið millum Føroyar og Russland kann halda fram, tó við ávísum avmarkingum. Kunngerðin um avmarkandi tiltøk fevnir tískil um serstakt undantak frá forboðnum fyri havnaatgongd fyri skip undir russiskum flaggi, sum fiska sambært sínámillum fiskiveiðuavtaluni.

[12] Sí leinkju: https://www.consilium.europa.eu/en/policies/sanctions-adoption-review-procedure/#challengingv
[13] Ávísar matvørur eru fevndar av forboðinum fyri útflutningi av marglætisvørum. Hesar reglur eru eisini settar í gildi í Føroyum.
[14] Sáttmáli millum Føroya landsstýri og donsku stjórnina øðrumegin og stjórn Sovjetsamveldisins hinumegin um sínámillum fiskiviðurskifti millum Føroyar og Sovjetsamveldið, undirritað í Tórshavn hin 27. november 1977.

Sambært undantakinum í føroysku kunngerðini kunnu skip undir russiskum flaggi, sum fiska sambært fiskiveiðuavtaluni millum Føroyar og Russland, koma í føroyska havn, um tey hava ørindi, ið eru knýtt at fiskiskapi, t.e. umskiping ella landing av veiðu, sum er heimilað í fiskiveiðiavtaluni millum Føroyar og Russland, tó treytað av, at onnur veiða ikki er umborð. Skip undir russiskum flaggi, sum fiska sambært fiskiveiðuavtaluni, kunnu harumframt koma í føroyska havn, um eingin veiða er umborð, tó treytað av at fiskiskipið fer beinleiðis til fiskiskap, ið er heimilaður í fiskiveiðiavtaluni.

Í báðum førum kunnu skip undir russiskum flaggi, um treytirnar annars eru loknar, keypa vørur og tænastuveitingar, sum eru loyvdar eftir vanligu reglunum í kunngerðini fyri útflutning, sølu, ella flytan av vørum og tænastuveitingum til Russlands ella russiskar eindir. Vanligu reglurnar um frysting av ogn eru tó eisini galdandi fyri slík skip. Tað merkir, at skip, sum eru ogn hjá persóni ella eind, sum sambært § 3 í kunngerðini er á listanum til skjal 1 til fyriskipan 269/2014 (EU), skal frystast í Føroyum.

Hóast Føroyar sum nevnt hava lagt seg eftir at seta ES-tiltøkini í verk í Føroyum, í støðum við fyrimynd í norska leistinum, so er føroyski leisturin ikki í øllum lutum tann sami, sum hevur verið nýttur í ES. Yvirskipað ber til at siga, at avmarkandi tiltøkini, sum ES hevur sett í gildi, eru sera umfatandi, og tey fevna um nógv ymiskt virksemi, heruppií ikki einans vinnuligt virksemi. Avmarkandi tiltøkini, sum eru sett í verk í Føroyum sambært kunngerð um avmarkandi tiltøk, fevna í støðum um ávísar avmarkaðar tillagingar til føroysk viðurskifti, eins og framferðarhátturin í støðum er øðrvísi. Til dømis eru í føroysku kunngerðini nevndar tær vørur, sum eru loyvdar at selja, flyta ella útflyta til Russlands, meðan avmarkandi tiltøkini hjá ES nevna tær vørur, sum ikki eru loyvdar at selja, flyta ella útflyta til Russlands; hetta er tó treytað av, at møguligur útflutningur er í samsvari við serligu reglurnar um útflutningseftirlit fyri tvínýtsluvørur (*dual-use goods*) og aðra serliga tøkni.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Lógaruppskotið hevur til endamáls at víðka heimildina hjá landsstýrisfólkinum, á yvirtiknum málsøkjum, at áseta onnur tiltøk móti Russlandi ella Hvítarusslandi, sum eru samtykt av millumtjóða felagsskapum, ella sum hava breiða millumtjóða undirtøku, og sum hava til endamáls at tryggja frið og trygd og virðing fyri fólkaræði og rættarsamfelagi, mannarættindum ella altjóðarætti annars. Við uppskotinum fær landsstýrisfólkið greiða heimild at seta onnur tiltøk í verk, sum eru leys av fortreytini og endamálinum at "...tryggja sjálvræðisrættin, óheftnið og støðufestið hjá Ukraina".

Tað verður eisini mett rættast at broyta heitið á løgtingslógini til "løgtingslóg um ávís avmarkandi tiltøk", soleiðis at tað verður greitt, at endamálið við uppskotinum er at víðka um heimildirnar hjá landsstýrisfólkinum at seta tiltøk í verk móti nevndu londum, um treytirnar, sum eru nevndar omanfyri, eru loknar. Sostatt er talan ikki um eina generella løgtingslóg um avmarkandi tiltøk, og fevnir uppskotið ikki um eitt nú tiltøk mótvegis øðrum enn nevndu londum. Víst verður til viðmerkingarnar til uppskotnu § 1, nr. 5 (§ 5 a), har nevndu avmarkingar eru umrøddar nærri.
Tey tiltøk, sum hugsað verður um, eru fyrst og fremst tey, sum ES og onnur lond hava sett í verk við viðkomandi ráðsavgerðum og fyriskipanunum 2024/2642, 2024/1484 og 2024/1485 (EU). Fyriskipan 2024/2642 (EU) viðvíkir tiltøkum í sambandi við, at ES-myndugleikarnir hava staðfest, at Russland stendur fyri ella hevur umbiðið hybridatgerðir í øðrum londum, sum hava til endamáls at ávirka støðufestið í viðkomandi landi, men sum eru undir markinum fyri veruligari krígsførslu. Eitt eyðkenni fyri slíkar atgerðir er eisini, at tað kunnu vera sivilir

persónar og eindir (*Non-state actors*), sum eru búsitandi í, ella hava heimstað í ES-limalondum ella triðjalondum, sum útinna atgerðirnar[15].

Fyriskipanirnar 2024/1484 og 2024/1485 viðvíkja brotum á grundleggjandi mannarættindi og vantandi rættartrygd innanhýsis í Russlandi, sum ES-myndugleikarnir hava eyðmerkt seinastu árini. Dømini eru eitt nú, at talufrælsið verður skert, at persónar, sum finnast at russisku stjórnini og krígsførsluni í Ukraina, heruppií andstøðupolitikarar, verða fongslaðir, at rættarskipanin í Russlandi ikki tryggjar rættvísan, almennan og óheftan rættargang o.tíl. Ítøkiligu tiltøkini sambært hesum fyriskipanum fevna bæði um frysting av ognum hjá persónum og eindum og handilsavmarkingar o.a.

Uppskotið hevur við sær, at heimilað verður landsstýrisfólkinum at seta tiltøk í verk móti persónum og eindum í sambandi við illgruna um hybridatgerðir, sum eru framdar í og/ella móti øðrum londum, heruppií serliga ES-limalondunum, og at tiltøk kunnu setast í verk í sambandi við grundleggjandi brot á mannarættindi í Russlandi. Eisini kunnu tiltøkini, eins og eftir galdandi løgtingslóg, setast í verk móti persónum ella eindum uttan mun til tjóðskap, skrásetingar- ella heimstað.

Í uppskotnu ásetingini verður sipað til "Russland og Hvítarussland". Hetta er ætlað sum ein avmarking, soleiðis at atgerðir ella onnur viðurskifti, sum eru grundarlagið fyri avmarkandi tiltøkunum, sum eru samtykt í millumtjóða felagsskapum ella við breiðari millumtjóða undirtøku, skulu hava ávíst tilknýti til Russland ella Hvítarussland. Uppskotna heimildin fevnir ikki um avmarkandi tiltøk, sum burturav eru rættað móti øðrum londum, heruppií sonevnd sekunder tiltøk, t.e. tiltøk móti øðrum londum, t.d. tí tey hava nógvan samhandil við Russland ella Hvítarussland.

Uppskotna heimildin fevnir til dømis um handilsavmarkingar móti Russlandi og Hvítarusslandi og, tá ið talan er um tiltøk móti ítøkiligum persónum ella eindum, um persónar, sum eru búsitandi í, og um eindir, sum hava heimstað í, nevndu londum. Ásetingin fevnir eisini um aðrar persónar og eindir, og eisini um virksemi, sum hevur til endamáls at raka onnur lond ella millumtjóða felagsskapir, heruppií ES, men tó einans um atgerðirnar ella viðurskiftini, sum eru orsøkin til avmarkandi tiltøkini, kunnu sigast at hava ávíst tilknýti til Russland ella Hvítarussland.

Kravið um tilknýti skal tó skiljast í ljósinum av tí virksemi, sum er umrøtt í fyriskipan 2024/2642, og tískil ikki ov bókstaviliga. Eitt nú eru tiltøkini eftir fyriskipan 2024/2642 ætlað sum svar upp á ikki-hernaðarligar atgerðir, sum kunnu vera framdar av sivilum persónum, sum eru búsitandi í øðrum londum, ella sum hava annan tjóðskap enn russiskan ella hvítarussiskan. Avmarkingin hevur sostatt við sær, at persónur ella eind, sum kann vera búsitandi í ella hava heimstað í øðrum landi, til dømis skal vera undir illgruna fyri at hava framt gerðir, heruppií eftir áheitan, umbøn ella við stuðli frá eindum í Russlandi ella Hvítarusslandi. Kravið um, at persónur skal vera undir illgruna, skal her skiljast sum lokið, um illgrunin er til staðar í millumtjóða felagsskapum ella í fleiri londum, til dømis sum staðfest við teimum tiltøkum, sum millumtjóða felagsskapir ella londini hava sett í verk. Kravið hevur sostatt ikki neyðturviliga við sær, at persónar ella eindir skulu vera undir illgruna í Føroyum.

Tað er ikki ein treyt, at persónurin ella eindin skal virka fyri, ella at gerðirnar skulu verða framdar vegna, almennu stjórnirnar í Russlandi ella Hvítarusslandi. Kravið er tískil eisini lokið,

[15] Council Decision (CFSP) 2024/2643 of 8 October 2024, p. 14.

um gerðirnar eitt nú eru umbidnar ella stuðlaðar av privatum persónum ella eindum í øðrum londum, heruppií felagsskapum, sum beinleiðis ella óbeinleiðis stuðla Russlandi ella Hvítarusslandi. Í hesum sambandi skal havast í huga, at markið millum privat og alment virksemi í nevndu londum ikki altíð er greitt.

Eins og í upprunaliga lógaruppskotinum frá 2022 eru heimildirnar, sum skotið verður upp at lata landsstýrisfólkinum, ikki avmarkaðar til tiltøk, sum frammanundan eru sett í gildi í eitt nú ES, men fevna eisini um tiltøk við øðrum bakstøði og endamáli. Tað verður mett neyðugt at víðka heimildina á hendan hátt, tí um Russland ikki ger av at broyta atburð, so kann roknast við, at ES og onnur lond í framtíðini fara at seta onnur og fleiri tiltøk í verk, sum ikki neyðturviliga eru avmarkaði til tiltøk í sambandi við hybridatgerðir ella brot á mannarættindi. Mett verður, at tað er skynsamt í mun til støðu Føroya mótvegis umheiminum, at landsstýrið kann seta slík tiltøk í verk við kunngerð, uttan at lógarbroyting er kravd, um onnur lond seta tiltøk í verk við øðrum bakstøði ella endamáli.

Áðrenn tiltøk verða sett í verk, skal tað, eins og eftir galdandi løgtingslóg, gerast ein ítøkilig meting um, hvørt tiltøkini rúmast innan fyri verandi heimildir, ella um tað er neyðugt at broyta heimildarlógina. Hóast slík tiltøk eftir eina ítøkiliga meting mugu haldast at rúmast innan fyri heimildarásetingarnar, so skal landsstýrið eftir § 54 í stýrisskipanarlógini harumframt meta um, hvørt talan er um tiltøk, sum hava stóran uttanríkispolitiskan týdning, soleiðis at landsstýrisfólkið hevur skyldu til at ráðføra seg við Løgtingsins Uttanlandsnevnd frammanundan.

1.3.1 *Serligt um fiskiveiðusamstarvið millum Føroyar og Russland*
Skotið verður upp, at landsstýrisfólkið kann gera av at seta onnur avmarkandi tiltøk í verk í Føroyum, heruppií við støði í hybridtiltøkunum hjá ES sambært fyriskipan 2024/2642 (EU). Í løtuni eru ítøkilig tiltøk sett í verk í ES-limalondunum við heimild í fyriskipanini, móti eitt nú russisku feløgunum Murman SeaFood og Norebo JSC, sum eiga skip við fiskiloyvum í føroyskum sjógvi.

Á heimasíðuni hjá VØRN er eitt yvirlit yvir útlendsk fiskiloyvi, sum fevnir um upplýsingar um skip undir russiskum flaggi, sum fiska sambært sínámillum fiskiveiðuavtaluni[16]. Sambært sínámillum fiskiveiðuavtaluni millum Føroyar og Russland fyri 2025, s. 10, hevur Russland rætt til at fráboða í mesta lagi 28 fiskifør til VØRN[17]. Í løtuni er tað tó ikki greitt, hvussu stórur partur av skipunum, sum eru fráboðaði til VØRN, eru at meta sum ogn hjá nevndu feløgum sambært tí leisti, sum í ES verður nýttur at staðfesta ognarskap. Víst verður til viðmerkingarnar um hesa mannagongd undir broti 1.2 í uppskotinum.

Ítøkiligu tiltøkini fevna í løtuni um skyldu at frysta ogn hjá persónum og eindum, sum eru fevnd av tiltøkunum, umframt um forboð fyri at lata ogn til, ella at lata ogn vera tøka hjá nevndu persónum og eindum, samanber § 3 í galdandi løgtingslóg. Ognirnar eru at meta sum frystar í tí løtu, tiltøkini eru sett í verk, og tískil kann hetta merkja, at eitt nú skip, sum eru fryst, og sum eru ella verða staðsett í føroyskum sjóøki ella havnum, ikki kunnu fara úr sjóøkinum aftur, í tann mun hetta annars er sambæriligt við havrættarsáttmálan.

Vísandi til, at hugtakið "ogn" skal skiljast í breiðastu merking, fevnir forboðið fyri at lata ogn til, ella at lata ogn vera tøka hjá persónum ella eindum, sum eru fevnd av tiltøkunum, sum

[16] Sí leinkju: https://hagtol.vorn.fo/fvePortal.exe/foreignlicens
[17] Sínámillum fiskiveiðuavtalan er tøk her: https://landsstyri.cdn.fo/savn/ogwjeemm/sinamillum-fiskiveidiavtala-millum-foeroyar-og-russland-fyri-2025.pdf?s=3qDtFDdvlMJi-fuBVlLscfiK8CQ

byrjanarstøði eisini um fiskiloyvi í føroyskum sjógvi, sum í hesum sambandi eru at meta sum búskaparligt tilfeingi. Tískil kunnu slík loyvi hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis latast persónum ella eindum, sum eru fevnd av tiltøkunum, heruppií gjøgnum feløg ella løgfrøðiligar eindir. Í tann mun talan er um atgongdarloyvi at fiska aðrar kvotur í føroyskum sjógvi, heruppií NEAFC-kvotur, verður hetta eisini mett at verða fevnt av forboðnum, tí slíkar kvotur eru somuleiðis búskaparligt tilfeingi, sum er staðsett innan fyri fiskiveiðuløgdømi Føroya.

Samanumtikið er tað fatanin hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, at hóast avgerð skuldi verið tikin um at seta hybridtiltøkini í verk í fullum líki í Føroyum, so útihýsir hetta ikki í sjálvum sær, at fiskiveiðusamstarvið millum Føroyar og Russland kann halda fram, um hetta framvegis er eitt ynski hjá sáttmálapørtunum. Sum greitt er frá omanfyri merkja hybridtiltøkini kortini, at nevndu feløg ikki kunnu gagnnýta kvotur ella atgongd, sum Føroyar lata Russlandi í býti sambært einari møguligari fiskiveiðuavtalu.

Viðvíkjandi karmsáttmálanum um fiskiveiðu frá 1977 metir Uttanríkis- og vinnumálaráðið, at nevndu tiltøk kunnu setast í verk, uttan at talan verður um sáttmálabrot. Hetta er undir øllum umstøðum galdandi um so er, at møguleikin hjá nevndu feløgum at gagnnýta fiskiloyvini ikki verður skerdur fyrr enn eftir 1. januar 2026, tá ið verandi sáttmálatíðarskeið heldur uppat. Verður gjørt av seta tiltøkini í verk, og verður tað somuleiðis gjørt av at fara undir fiskiveiðusamráðingar við Russland í 2025, so eiga føroysku myndugleikarnir at gera russisku myndugleikunum greitt, hvør rættarstøða tá er galdandi fyri skip undir russiskum flaggi, sum ætlandi skulu fiska í føroyskum sjógvi.

Viðvíkjandi havnaatgongd metir Uttanríkis- og vinnumálaráðið, at havrættarsáttmálin og altjóða rættur annars ikki geva skipum undir fremmandum flaggi rætt til at krevja havnaatgongd í øðrum londum uttan so, at talan er um veruligar neyðstøður. Munandi avmarkingar kunnu tískil gerast fyri havnaatgongd fyri skip undir fremmandum flaggi í tjóðarlóggávu, uttan at hetta er í andsøgn við altjóðarætt. Uttanríkis- og vinnumálaráðið metir somuleiðis, at hvørki karmsáttmálin frá 1977 ella galdandi fiskiveiðuavtala frá 2025 regulera spurningin um atgongd fyri skip hjá einum sáttmálaparti til havnir hjá hinum sáttmálapartinum. Tískil kunnu slík viðurskifti sum byrjanarstøði verða regulerað í tjóðarlóggávu, sum kann fevna um avmarkingar fyri skip hjá ávísum feløgum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við uppskotinum fær landsstýrisfólkið heimild til á yvirtiknum málsøkjum at seta í verk onnur avmarkandi tiltøk móti Russlandi og Hvítarusslandi, sum eru samtykt av millumtjóða felagsskapum, ella sum hava breiða millumtjóða undirtøku, og sum hava til endamáls at tryggja frið og trygd og virðing fyri fólkaræði og rættarsamfelagi, mannarættindum ella altjóðarætti annars.

Fyrimunurin við uppskotna leistinum er, at landsstýrisfólkið við kunngerð kann seta tiltøk í verk, sum hava annað bakstøði og eru ætlað at røkka øðrum endamálum enn at *"...tryggja sjálvræðisrættin, óheftnið og støðufestið hjá Ukraina"*, eins og eitt nú ES og Noreg hava gjørt.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Stundir hava ikki verið at senda uppskotið alment til ummælis. Ístaðin skipaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið tann 4. august fyri ummælisfundi, har umboð fyri vinnuna tóku lut. Á fundinum vóru umboð fyri reiðaríini, sum fiska í Barentshavinum, umboð fyri útflutningsvinnuna, umboð fyri veitaravinnuna og umboðsmenn, ið taka sær av russiskum

skipum, ið koma í føroyska havn. Somuleiðis vóru umboð fyri Føroya Reiðarafelag og Vinnuhúsið á fundinum.

Á fundinum varð greitt frá ætlaðu broytingunum í løgtingslógini um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina og bakstøðinum fyri hesum broytingunum, m.a. at ES og Noreg hava sett hesi avmarkandi tiltøkini í verk. Greitt varð frá týdninginum, sum tað hevur, at Føroyar fylgja samsintum londum – londum, ið vit trygdarpolitiskt eru samd við – tá ið talan er um at seta tiltøk í verk ímóti Russlandi og Hvítarusslandi. Somuleiðis varð greitt frá, hvørji tiltøk kunnu væntast at verða sett í verk við kunngerð, um Løgtingið tekur undir við uppskotinum, heruppií at skip hjá ávísum russiskum reiðaríum frameftir ikki væntast at sleppa í føroyska havn ella at kunna fiska í føroyskum sjóøki.

Yvirskipað kann sigast, at umboðini fyri vinnuna førdu fram, at Føroyar eiga ikki at seta tiltøk í verk, hóast bæði ES og Noreg hava gjørt tað. Grundirnar vóru fleiri, m.a. at umboðini fyri vinnuna óttaðust fyri, at nýggju avmarkingarnar kunnu føra til, at áhugin hjá Russlandi at gera fiskiveiðiavtalu fyri 2026 minkar. Um áhugi framhaldandi er fyri at gera fiskiveiðuavtalu, er tað tó ikki óhugsandi, at talan gerst um verri avtalu enn hana, sum vit hava í løtuni. Reiðaríini, hvørs skip fiska í Barentshavinum, løgdu í hesum sambandi dent á týdningin, tað hevur fyri tey at kunna fiska russisku kvotuna í norskum sjóøki.

Vandin fyri at Russland speglar avmarkandi tiltøkini, sum Føroyar seta í verk móti teimum, varð umrøddur. Somuleiðis varð vandin fyri, at Russland setir í verk móttiltøk, sum kunnu raka føroyska fiskaútflutningin til Russlands, nevndur. Umboðini fyri útflutningsvinnuna løgdu dent á, at russiski marknaðurin serliga hevur týdning fyri útflutningin av sild.

Upp á fyrispurning varð greitt frá, hvørja skiftisskipanir Noreg hevur sett í gildi fyri restina av 2025. Heitt varð á landsstýrið um eisini at umhugsa skiftisskipanir, um so verður, at nýggjastu avmarkingarnar hjá ES og Noreg eisini verða settar í gildi í Føroyum.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Við uppskotinum verða heimildir landsstýrisfólksins at seta í verk onnur avmarkandi tiltøk mótvegis Russlandi og Hvítarusslandi á yvirtiknum málsøkjum víðkaðar. Uppskotið setir tó ikki ítøkilig tiltøk í verk, og uppskotið hevur sostatt ikki við sær beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri landið ella kommunurnar.

Um ítøkilig tiltøk verða sett í verk, kann ikki útihýsast, at Russland fer at víðka síni móttiltøk til eisini at fevna um Føroyar, ella at hugurin hjá Russlandi at halda fram við fiskivinnusamstarvinum við Føroyar minkar. Tað er tó trupult at meta um, hvørt tað er sannlíkt, at Russland vil seta móttiltøk í verk móti Føroyum, og, um so er, hvørji móttiltøk talan tá verður um, ella hvørt Russland í nevndu støðu vildi mett, at framhald av fiskiveiðusamstarvinum er lønandi.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið setir ikki ítøkilig tiltøk í verk. Uppskotið hevur tískil ikki við sær beinleiðis umsitingarligar avleiðingar fyri landið, fyri kommunurnar ella fyri privat.

Sum umrøtt undir broti 1.2 fevnir regluverkið um avmarkandi tiltøk um eitt nærlagniskrav, sum er galdandi fyri almennar myndugleikar og privat vinnurekandi, og sum hevur við sær, at rímiligt nærlagni skal útinnast til tess at tryggja, at reglurnar um avmarkandi tiltøk verða hildnar, heruppií í mun til persónar og eindir, sum eru á sanksjónslistunum, í mun til ogn, sum er fryst, handilsavmarkingar o.a. Um tiltøk verða sett í verk móti ítøkiligum persónum og eindum, so kann hetta hava við sær umsitingarligar avleiðingar fyri almennar myndugleikar og fyri privat vinnurekandi, sum í størri mun enn áður skulu tryggja sær, at tey halda skyldur sínar sambært løgtingslógini um avmarkandi tiltøk. Hetta er fyrst og fremst viðkomandi fyri tann partin av almenna, kommunala og privata geiranum, sum eitt nú veitir tænastur ella útflytur til Russlands ella Hvítarusslands, men er tó ikki avmarkað til hesar geirar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Víst verður til pkt. 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur og til viðmerkingarnar undir pkt. 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Um avmarkandi tiltøk verða sett í verk í Føroyum við heimild í § 5 a, kann hetta hava við sær ávísar avleiðingar fyri persónar og eindir, sum eru fevnd av tiltøkunum, serliga um hesi hava ognarlutir í Føroyum.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Mett verður, at tiltøkini, ið kunnu setast í verk við heimild í uppskotnu § 5 a, ikki eru ósambærilig við karmsáttmálan millum Føroyar og Russland frá 1977 ella við fiskiveiðuavtaluna frá 2024. Tað kann tó ikki útihýsast, at tað, at ítøkilig tiltøk verða sett í verk við heimild í uppskotnu § 5 a, kann fáa avleiðingar fyri hesar sáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) **Hoyvíkssáttmálin**
Hoyvíkssáttmálin er ikki viðkomandi fyri lógaruppskotið, sum ikki ávirkar samhandilin millum Føroyar og Ísland.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS**
Evropeiski mannarættindasáttmálin er settur í gildi fyri Føroyar við *Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneske-rettighedskonvention*.

Sambært grein 6 í evropeiska mannarættindasáttmálanum hevur ein og hvør rætt til rættvísa og almenna rættargongd við rímiligari freist, hjá einum óheftum dómstóli, ið er skipaður við lóg. Tað stendur eisini í grein 13, at ein og hvør, hvørs sáttmálarættindi eru brotin, hevur rætt at royna málið hjá einum myndugleika.

Ongar ítøkiligar ásetingar eru í hesum uppskoti ella í galdandi løgtingslóg um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina um kæru og partsinnlit, og tað eru tískil vanligu reglurnar í fyrisitingarlógini, sum eru galdandi, sí tó § 8 í galdandi løgtingslóg um partshoyring.

Harumframt er ásett í § 7 í galdandi løgtingslóg, at likamligir persónar, búsitandi í Føroyum, og løgfrøðiligir persónar, skrásettir í Føroyum, ið meta, at teir av óréttum eru settir á lista við persónum, ið eru fevndir av tiltøkum, sett í gildi við heimild í hesi løgtingslóg, kunnu lata landsstýrisfólkinum skrivliga umbøn um at verða strikaðir av listanum. Strikanin kann í hesum førum verða útint fyrisitingarliga av landsstýrisfólkinum.

Uppskotið, eins og galdandi løgtingslóg, inniheldur ikki serligar reglur ella avmarkingar í mun til vanliga rættin at royna mál í rættarskipanini eftir § 63, stk. 1, í grundlógini. Tískil verður mett, at uppskotið er í samsvari við processuellu rættindini eftir grein 6 og 13 í mannarættindasáttmálanum.

Sambært grein 1 í 1. ískoytisprotokoll til evropeiska mannarættindasáttmálan hevur ein og hvør likamligur ella løgfrøðiligur persónur rætt til virðing fyri síni ogn. Frysting av ognum er at meta sum inntriv í ognarrættin, tí talan er um fyribils avmarkingar í vanliga ræðisrættinum á ognum hjá viðkomandi í eitt tíðarskeið við tí endamáli at røkka endamálunum við avmarkandi tiltøkunum.

At talan er um inntriv skal tó ikki skiljast sum, at talan er um brot á ognarrættin, ella at inntrivið hevur við sær endurgjaldsskyldu, og eru tað heldur ongar ítøkiligar ásetingar um endurgjald fyri at verða settur á lista við persónum og eindum, fevnd av tiltøkum. Slík mál verða viðgjørd sambært vanligu reglunum í mannarættindasáttmálanum og donsku grundlógini.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
Lógaruppskotið er í samsvari við sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Tað eru ikki kendar markaforðingar á økinum, og mett verður ikki, at uppskotið fer at elva til slíkar forðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Sambært galdandi løgtingslóg kunnu brot á ásetingarnar í løgtingslógini ella reglur, sum eru ásettar við heimild í løgtingslógini, revsast við sekt ella við fongsli í upp í eitt ár, um ikki hægri revsing er ásett í aðrari lóggávu. Tilætlanarkravið er tilætlan ella grovt ósketni, og revsikarmurin fyri vanlig rættarbrot er sekt ella fongsul upp í eitt ár. Er talan um skerpandi umstøður, er revsingin sekt ella fongsul upp í tvey ár.

Nærri reglur um revsing eru ásettar í §§ 21-22 í kunngerð nr. 108 frá 18. november 2024 um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina, heruppií at tilvitað luttøka í virksemi, har endamálið ella virknaðurin beinleiðis ella óbeinleiðis er uttanumvik av reglunum í kunngerðini, verður revsað á sama hátt.

Skotið verður upp, at revsireglurnar í galdandi løgtingslóg eisini skulu fevna um brot á reglur, sum eru ásettar við heimild í § 5 a. Orsøkin til hetta er, at mett verður, at sami tørvur er á at kunna revsa brot á hesi tiltøk sum brot á tey tiltøk, ið eru ásett við heimild í galdandi løgtingslóg.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Sambært galdandi løgtingslóg hevur landsstýrisfólkið heimild at áseta nærri reglur um eitt nú krav um útflutningsloyvi og fráboðanarskyldu fyri likamligar og løgfrøðiligar persónar. Hetta uppskot áleggur ikki nýggjar skyldur. Tær skyldur, sum tað frammanundan er heimild at áseta nærri reglur um sambært galdandi løgtingslóg, fara tó eisini til at fevna um møgulig tiltøk, sum verða ásett í § 5 a.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Við uppskotinum fær landsstýrisfólkið heimild til á yvirtiknum málsøkjum at áseta onnur tiltøk móti Russlandi og Hvítarusslandi, sum eru samtykt av millumtjóða felagsskapum, ella sum hava breiða millumtjóða undirtøku, og sum hava til endamáls at tryggja frið og trygd og virðing fyri fólkaræði og rættarsamfelagi, mannarættindum ella altjóðarætti annars, og sum eru leys av fortreytini og endamálinum at "...tryggja sjálvræðisrættin, óheftnið og støðufestið hjá Ukraina".

Uppskotið hevur ikki við sær, at heimildir verða lagdar til stovnar undir landsstýrinum ella til kommunur í størri mun enn eftir galdandi løgtingslóg.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	Nei	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Til § 1, nr. 1

Við § 1, nr. 5 (§ 5 a) verður skotið upp at heimila landsstýrisfólkinum at seta onnur tiltøk í verk móti Russlandi og Hvítarusslandi enn tey, ið eru nevnd í §§ 1, 3 og 4 í galdandi løgtingslóg, við støði í avmarkandi tiltøkum samtykt av millumtjóða felagsskapum, ella sum hava breiða millumtjóða undirtøku, og sum hava til endamáls at tryggja frið og trygd ella virðing fyri fólkaræði, rættarsamfelagi, mannarættindum ella altjóðarætti annars. Endamálið við uppskotnu broytingini er at tryggja, at landsstýrisfólkið kann seta onnur tiltøk í verk, sum ikki neyðturviliga fara at standast av atgerðunum, sum eru framdar móti Ukraina í sambandi við innlimanina av Krim í 2014, innrásina í 2022, ella eftirfylgjandi, sbr. eisini orðingina í § 1 í galdandi løgtingslóg "...tryggja sjálvsræðisrættin, óheftnið og støðufestið hjá Ukraina".

Við hesum í huga, verður tað mett rættast at broyta heitið á løgtingslógini til "løgtingslóg um ávís avmarkandi tiltøk", soleiðis at tað verður greitt, at endamálið við uppskotinum er at víðka um heimildirnar hjá landsstýrisfólkinum at seta tiltøk í verk móti nevndu londum, um treytirnar, sum eru nevndar omanfyri, eru loknar. Sostatt er talan ikki um eina generella løgtingslóg um avmarkandi tiltøk, og fevnir uppskotið ikki um eitt nú tiltøk móti øðrum enn nevndu londum. Víst verður til viðmerkingarnar til uppskotnu § 1, nr. 5 (§ 5 a), har nevndu avmarkingar eru umrøddar nærri.

Til § 1, nr. 2 og nr. 3

Skotið verður upp at gera eina ritstjórnarliga broyting soleiðis, at orðið "landsstýrismaðurin" í løgtingslógini verður broytt til "landsstýrisfólkið".

Í § 7 verður skotið upp at broyta "landsstýrismanninum" til "landsstýrisfólkinum".

Til § 1, nr. 4

Talan er um eina ritstjórnarliga broyting. Skotið verður upp, at yvirskriftin uppi yvir § 5 í galdandi løgtingslóg verður *Onnur tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina*, og at yvirskriftin uppi yvir § 5 a verður *Onnur tiltøk.*

Víst verður annars til pkt. 1.1 í almennu viðmerkingunum.

Til § 1, nr. 5 (§ 5 a)

Ásetingin heimilar landsstýrisfólkinum á yvirtiknum málsøkjum at áseta nærri reglur um onnur avmarkandi tiltøk móti Russlandi og Hvítarusslandi við støði í avmarkandi tiltøkum, samtykt í millumtjóða felagsskapum, ella sum hava breiða millumtjóða undirtøku, og sum hava til endamáls at tryggja frið og trygd og virðing fyri fólkaræði, mannarættindum ella altjóðarætti annars.

Samanborið við orðingina í galdandi § 1 er heimildin breiðari, tí ásetingin sipar ikki til "...atgerðir, sum máa undan ella hótta sjálvræðisrættin, óheftnið og støðufestið hjá Ukraina". Tað verður tó framvegis ein treyt, at avmarkandi tiltøkini verða sett í verk við støði í avmarkandi tiltøkum, samtykt í millumtjóða felagsskapum, ella sum hava breiða millumtjóða undirtøku. Hugtakið "millumtjóða felagsskapir" sipar her fyrst og fremst til ES, men er ikki avmarkað til hendan felagsskap, og skal "breið millumtjóða undirtøka" heldur ikki skiljast sum

ein treyt um breiða undirtøku millum samsint lond, ella at ávís lond ella ávíst tal av londum skulu taka undir við tiltøkunum.

Í uppskotnu ásetingini verður sipað til "Russland og Hvítarussland". Hetta er ætlað sum ein avmarking, soleiðis at atgerðir ella onnur viðurskifti, sum eru grundarlagið undir avmarkandi tiltøkunum, sum eru samtykt í millumtjóða felagsskapum ella við breiðari millumtjóða undirtøku, skulu hava ávíst tilknýti til Russland ella Hvítarussland. Uppskotna heimildin fevnir ikki um avmarkandi tiltøk, sum burturav eru rættað móti øðrum londum, heruppií sonevnd sekunder tiltøk, tað er tiltøk móti øðrum londum, t.d. tí tey hava nógvan samhandil við Russland ella Hvítarussland.

Uppskotna heimildin fevnir t.d. um handilsavmarkingar móti Russlandi og Hvítarusslandi og, tá ið talan er um tiltøk móti ítøkiligum persónum ella eindum, um persónar, sum eru búsitandi í, og um eindir, sum hava heimstað í, nevndu londum.

Ásetingin fevnir harumframt um tiltøk móti persónum og eindum, sum ikki eru búsitandi í ella hava heimstað í Russlandi ella Hvítarusslandi, og eisini um virksemi, sum hevur til endamáls at raka onnur lond ella millumtjóða felagsskapir, heruppií ES, men tó einans um atgerðirnar ella viðurskiftini, sum eru grundarlagið undir tiltøkunum, kunnu sigast at hava ávíst tilknýti til Russland ella Hvítarussland. Kravið um tilknýti skal tó skiljast í ljósinum av tí virksemi, sum er umrøtt í fyriskipan 2024/2642, og tískil ikki ov bókstaviliga. Eitt nú eru tiltøkini eftir fyriskipan 2024/2642 ætlað sum svar upp á ikki-hernaðarligar atgerðir, sum kunnu verða framdar av sivilum persónum, sum eru búsitandi í øðrum londum, ella sum hava annan tjóðskap enn russiskan ella hvítarussiskan.

Avmarkingin hevur sostatt við sær, at persónur ella eind, sum kann vera búsitandi í ella hava heimstað í øðrum landi, til dømis skal vera undir illgruna fyri at hava framt gerðir, heruppií eftir áheitan, umbøn ella við stuðli frá eindum í Russlandi ella Hvítarusslandi. Kravið um, at persónur skal vera undir illgruna, skal her skiljast sum lokið, um illgrunin er til staðar í millumtjóða felagsskapum ella í fleiri londum, til dømis sum staðfest við teimum tiltøkum, sum millumtjóða felagsskapir ella londini hava sett í verk. Kravið hevur sostatt ikki neyðturviliga við sær, at persónar ella eindir skulu vera undir illgruna í Føroyum.

Tað er heldur ikki ein treyt, at persónurin ella eindin skal virka fyri, ella at gerðirnar skulu verða framdar vegna almennu stjórnirnar í Russlandi ella Hvítarusslandi. Kravið er tískil eisini lokið, um gerðirnar eitt nú eru umbidnar ella stuðlaðar av privatum í nevndu londum, ella av privatum í øðrum londum, heruppií felagsskapum, sum beinleiðis ella óbeinleiðis stuðla Russlandi ella Hvítarusslandi. Í hesum sambandi skal havast í huga, at markið millum privat og alment virksemi í nevndu londum ikki altíð er greitt.

Kravið um tilknýti til Russland ella Hvítarussland er eisini lokið, um talan er um gerðir ella viðurskifti, sum fara fram í landafrøðiligum økjum, sum veruliga eru undir russiskum ella hvítarussiskum ræði, til dømis ólógligt innlimaðu ella hersettu landaøkini í Ukraina. Sostatt kunnu tiltøk eisini setast í verk móti persónum ella eindum, sum eru staðsett í eitt nú hesum økjum, og uttan mun til tjóðskap ella formligt skrásetingarstað.
Tað er harumframt ein treyt fyri at kunna seta avmarkandi tiltøk í verk móti Russlandi og Hvítarusslandi, at tiltøkini hava til endamáls at tryggja í minsta lagi eitt av hesum: i) frið og trygd ella virðing fyri ii) fólkaræði, iii) rættarsamfelagi, iv) mannarættindum ella v) altjóðarætti annars. Hybridtiltøkini eftir fyriskipan 2024/2642 verða mett at vera fevnd av orðingini "frið og trygd", meðan tiltøkini eftir ráðsavgerð 2024/1484 og fyriskipan 2024/1485 verða mett at

vera fevnd av teimum í nr. 2-5 nevndu hugtøkum. Yvirskipað er tað eisini metingin, at tiltøk, sum ES setir í verk, vanliga vilja kunna rúmast innan fyri í minsta lagi eitt av hesum hugtøkum.

Heimildin er eisini ætlað at kunna fevna um onnur tiltøk, sum í løtuni ikki eru samtykt í millumtjóða felagsskapum, ella sum í løtuni ikki hava breiða millumtjóða undirtøku, men sum møguliga kunnu verða samtykt ella fáa undirtøku í framtíðini. Møgulig tiltøk eftir uppskotnu § 5 a eru sostatt ikki avmarkað í tíð, t.e., at tað er ikki ein treyt, at møgulig tiltøk eru fyrireikað, samtykt ella hava undirtøku í fleiri londum, áðrenn hetta uppskot er lagt fyri Løgtingið, og svarar hetta til heimildirnar eftir galdandi løgtingslóg. Til dømis kann nevnast, at partar av "sanksjónspakkunum" hjá ES, nr. 9-17 eru sett í verk í Føroyum, hóast innihaldsligu tiltøkini eru samtykt eftir at upprunaliga løgtingslógaruppskotið varð samtykt í 2022 í Føroyum. Uppskotna § 5 a fevnir tó eisini um møgulig tiltøk í framtíðini, sum eru samtykt í millumtjóða felagsskapum, ella sum hava undirtøku í fleiri londum, bæði sambært eitt nú fyriskipan 2024/2642 og 2024/1485 (EU) og sambært øðrum samtyktum ella avgerðum, sum kunnu hava annað bakstøði ella endamál enn nevndu fyriskipanir. Í tvístøðum má tað, eins og eftir galdandi løgtingslóg, metast um ítøkiliga, hvørt talan er um ætlað tiltøk, sum eru fevnd av verandi heimildum ella ikki.

Ásetingin vísir til §§ 1, 3 og 4 í galdandi løgtingslóg. Tilsipanin til § 1 skal her skiljast soleiðis, at tiltøk eftir § 5 a eru leys av avmarkingunum, sum eru ásettar í § 1, meðan tilsipanin til §§ 3-4 merkir, at landsstýrisfólkið, eins og eftir § 5 í galdandi løgtingslóg, kann velja at seta í verk onnur tiltøk enn handilsavmarkingar og frysting av ognum o.a. Slík tiltøk kunnu til dømis vera, men eru ikki avmarkað til, forboð móti fjarskiftissambandi, mentanar- ella vísindasamstarvi, luttøku í búskaparligum virksemi o.a.

Verður tað mett, at tiltøk, sum landsstýrið hevur í hyggju at seta í verk við heimild í § 5 a, hava stóran uttanríkispolitiskan týdning, hevur landsstýrisfólkið eftir § 54 í løgtingslóg um Stýrisskipan Føroya skyldu til at ráðføra seg við Løgtingsins Uttanlandsnevnd frammanundan.

Til § 1, nr. 6
Skotið verður upp at áseta, at undantakið viðvíkjandi partshoyring eftir § 18 í fyrisitingarlógini heldur ikki skal vera galdandi fyri tiltøk, sum eru sett í verk við heimild í § 5 a.

Í serligu viðmerkingunum til § 8 í galdandi løgtingslóg verður greitt frá, at orsøkin til, at partshoyringarskyldan eftir § 18 í fyrisitingarlógini ikki er galdandi fyri avgerðir um frysting av ognarlutum og um at seta persónar og eindir á sanksjónslistar eftir § 4 í galdandi løgtingslóg, er, at vandi er fyri, at tiltøkini missa virknað, um tað ber til at flyta møguligar ognarlutir, meðan partshoyring verður framd.

Innihaldsligu tiltøkini, sum kunnu setast í verk við heimild í § 5 a, eru fyrst og fremst at seta viðkomandi persónar og eindir á sanksjónslistar og at frysta ognarlutir hjá nevndu persónum og eindum. Sostatt gera somu fyrilit seg galdandi í sambandi við § 5 a, sum eftir galdandi § 4, og tað verður tískil mett skynsamt at áseta, at partshoyringarskyldan ikki er galdandi í slíkum førum.

Til § 1, nr. 7
Talan er um eina fylgibroyting, soleiðis at revsiheimildin í § 10 í galdandi løgtingslóg eisini er galdandi fyri tiltøk, sum eru ásett við heimild í § 5 a.

Til § 2

Ásett verður, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 14. august 2025

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur

Fylgiskjal 2: Ráðsavgerð 2024/1484 (EU), samanskrivað 28/05/2025.

Fylgiskjal 3: Fyriskipan 2024/1485 (EU), samanskrivað 28/05/2025.

Fylgiskjal 4: Ráðsavgerð 2024/2643 (EU), samanskrivað 15/07/2025.

Fylgiskjal 5: Fyriskipan 2024/2642 (EU), samanskrivað 15/07/2025.